# Fáa dagstovn í Hósvík



*Um hálvan september í ár verður nýggi dagstovnurin í Hósvík klárur. Pláss verður fyri beint undir 60 børnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í Hósvík er farið í gongd við at byggja ein spildur nýggjan dagstovn, har pláss verður fyri beint undir 60 børnum**

DAGSTOVNUR
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

**Hósvík:** Um hálvan september í ár skal eftir ætlan standa ein nýggjur dagstovnur í Hósvík.

Fyri umleið trimum mánaðum síðani varð farið undir at byggja ein dagstovn í bygdini.

– Bygdin stendur í vøkstri, so um vit skulu tryggja okkum, at barnafamiljur skulu tíma at vera her, so mugu allir hentleikar vera í lagi, sigur Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík.

Sum er nú, hevur kommunan eina dagrøktaskipan. Ætlanin er, at dagrøktarmammurnar, sum arbeiða í skipanini, skulu fáa arbeiði á stovninum.

Umleið 45 børn eru í løtuni í dagrøktarskipanini hjá Hósvíkar Kommunu, men á nýggja stovninum verður pláss fyri beint undir 60 vøggustovu- og barnagarðsbørnum.

Á stovninum verða stovur bæði í erva og í neðra, og møguleiki verður eisini fyri frítíðarskúla. Tó sigur Jógvan Mørkøre, at tað kann væl verða, at frítíðarskúlin verður onkra aðrastaðni í bygdini.

Kostnaðurin fyri nýggja dagstovnin í Hósvík liggur umleið 4,5 mió krónur.

**Hjálparfólk**
til slaktaran í Miklagarði

Slaktarin í Miklagarði í SMS søkir eftir fólki at byrja skjótast gjørligt. Ert tú slaktari, kokkur ella hugaður fyri at arbeiða við mati og kjøti, ert tú kanska tann rætti. Vit vænta, at tú ert arbeiðssamur, ágrýtin og røkin.

Starvið er fulltíðarstarv. Løn sambært galdandi sáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn til Miklagarð, Postsmoga 1069, 110 Tórshavn, att: Jørgen Jørgensen.
Tað ber eisini til at ringja til Jørgen á tel 21 74 04 og hoyra nærri um starvið.

*Miklagarður er størsti matvøruhandil í Føroyum við eini gólvvídd upp á 1.700 fermetrar og við meiri enn 10.000 vørunumrum. Í Miklagarði starvast 80 fólk.*

MIKLAGARÐUR
SMS • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 30 11

**Út at ferðast?**

Støkk inn á gólvið og tosa við okkum um

**Ferðapening!**

Vælkomin

SUÐUROYAR SPARIKASSI
Postboks 2 · FO-900 Vágur / FO-950 Porkeri / Postboks 374 · FO-110 Tórshavn

**Hús til sølu**

**Dalavegur 50 í Tórshavn** • Miðskeiðis í býnum við útsýni yvir Havnina



Húsini eru vælhildin og standa høgliga fyri í veðurgóðum umhvørvi miðskeiðis í býnum við útsýni yvir Havnina. Húsini eru í tveimum hæddum við einum høgum útbygningi á miðhæddini. Uttanfyri er stórur urtagarður.
**Miðhædd:** Gongd, køkur, stór stova, loftstova, 2 kømur, baðirúm við gosbað/toilett, gestatoilett og hjallur.
**Kjallarahædd:** 3 kømar, goymslurúm, fýr og vaskirúm, toilett.
Uttanfyri er stórt "fjós", sum er innrættað og hevur verið brúkt sum seymistova. Húsini kunnu einsvæl nýtast til skrivstovuvirksemi av ymiskum slag.

| Um húsini: | |
|---|---|
| Byggiár: | 1987 |
| Vídd á grundøki: | 1124 fermetrar |
| Innrættað vídd | 280 fermetrar |

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

inni
- trygt og ómakaleyst til hús

Inni P/f • N. Finsensgøta 37 • 100 Tórshavn
Tel 320410 • Fax 320510



# Starvsmannafelagið hvessir tónan

**Viðurskiftini hjá starvsfólki í Tórshavnar kommunu og millum Tórshavnar kommunu og Starvsmannafelagið eru nú so vánalig, at um alt ikki skal syndrast, má leiðslan í høvuðsstaðnum av álvara taka sær annað skinn um bak, sigur Starvsmannafelagið, sum í opnum brævi til Tórshavnar kommunu hvessir tónalagið**

OPIÐ BRÆV
*Starvsmannafelagið*

- Skilið kann ikki halda fram, her má ruddast upp nú!

Soleiðis byrjar Starvsmannafelagið brævið, ið er sent til Tórshavnar kommunu um viðurskiftini hjá starvsfólkunum í kommununi.

– Ferð eftir ferð vísir landsins størsta kommuna sínum starvsfólki sína manglandi virðing. Arbeiðsskipanir, útrokningarskipanir og hvørt av sínum verður broytt frá degi til dags, uttan at starvsfólk ella fakfelag vita av og enn minni verða spurd, sigur Starsvmannafelagið.

Sambært teimum fer kommunan lætt um sáttmálaásetingar og lóg. „Gongur tað, so gongur tað”", tykist vera aðalprinsippið hjá kommunalu myndugleikinum í Tórshavn.

Í 2000 gav táverandi Tórshavnar kommunala Starvs- og Tænastumannafelag legði saman við Starvsmannafelagnum. Orsøkin var heilt einføld: Felagið hevði ikki orku til at hondheva sáttmálan við kommununa.

– Vit tóku yvir í góðum treysti, men tað skuldi vísa seg, at so nógvir trupulleikar alla tíðina standast av handfaring Tórshavnar kommunu av sáttmála, lóg, vanligum góðum fyrisitingarsiði og fólkaligheit soleðis, at vit hava verið noydd at brúka stóran part av okkara orku at royna at ansa eftir Tórshavnar kommunu.

### Fyrireika kæru og rættarmál

Hóast roynt hevur verið við góðum í langa tíð, og hóast sáttmálaviðurskiftini nú eru broytt soleiðis, at sáttmáli nú verður gjørdur við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, har Tórshavnar kommuna er limur, so eru eingi tekin til, at kommunan ætlar sær at vísa seg sum loyalan samstarvspart við Starvsmannafelagið ella felagsins limir.

Starvsmannafelagið hevur tí gjørt av at senda øll týðandi stríðsmál við Tórshavnar kommunu til Føroya rætt, gerðarrætt, Føroya Landsstýri ella Løgingsins Umboðsmann, alt eftir hvat slag av málum talan er um. Hvussu nógv mál av hvørjum slagi, talan verður um, er ikki endaliga greitt, men Starvsmannafelagið roknar við, at hetta verður klárt einaferð stutt eftir summarfrítíðina.

Felagið ásannar, at tað er harmiligt, at hetta skal vera neyðugt, men hinvegin má felagið eisini ásanna, at tað ber ikki til at fáa Tórshavnar kommunu at uppføra seg seriøst ella at taka sáttmála, starvsfólk ella fakfelag í álvara og við virðing, sum sømir seg.



### Nøkur mál

Upp í saman hevur Starvsmannafelagið verið noytt at venda sær til kommununa, eftir at starvsfólk hava kært sína neyð til felagið:

Uttan orð ella eið broytti kommunan arbeiðsskipanina á skúlatannlæknastovuni, soleiðis at arbeiðstíðin í veruleikanum øktist - fyri óbroytta løn.

Uttan orð ella eið gjørdi kommunan eina útrokning av frítíðarløn til dagrøktarar, soleiðis at hesar fingu minni løn - ja, minni enn sjálv lógin um frítíðarløn ásetir. Starvsmannafelagið kærdi til landsstýrið. Tórshavnar kommuna lovar bót og bata - einki hendir.

Uttan orð ella ei broytir kommunan útrokning av frítíðarløn av vaktargjøldum frá 12% niður í 1,5%. Ongin verður spurdur, eingin verður hoyrdur og eingin grundgeving verður givin.

Tað stendur í sáttmálanum, at dagrøktarar skulu hava løn undir sjúku. „Tað er ein feilur”, sigur kommunan eftir einaferð enn at hava skrivað undir sama sáttmála! Og dagrøktarar fáa ikki løn undir sjúku, hóast tað stendur í sáttmálanum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið boðaði frá longu 12. januar, at teir fyrireikaðu málið til gerðarætt. Tá so einki hendi, avgjørdi Starvsmannafelagið 23. februar at leggja málið fyri gerðarætt, men enn í skrivandi stund hevur gerðarætturin ikki so frægt sum fingið eitt svar frá hinum partinum. Starvsmannafelagið hevur tí nú biðið sín advokat um at brúka øll amboð, sum lógin hevur, fyri at tvinga eina avgerð ígjøgnum, so Kommunala Arbeiðsgev-arafelagið (tað er í hesum føri tað sama sum Tórshavnar kommuna) ikki skal sleppa at halda fram við at súlta og forhála málið.

Í mong ár hevur stempulklokkuskipanin havt ein knøtt, sum fólk skulu trýsta á, tá tey fara til jarðarferð ella lækna. Hetta hava tey gjørt í hesi ár, uttan at tey vórðu drigin í løn fyri hetta.



Hetta ætlaði kommunan at broyta frá degi til dags, uttan at hoyra ella spyrja nakran. Hetta fingu fakfeløgini so útsett í eina tíð. Men at virða hesa skipan sum part av sáttmálanum og siga hana upp saman við sáttmálanum, kundi ikki fallið Tórshavnar kommunu inn. Tískil er felagið tvingað at fáa rættarúrskurð um hetta.

### Avleiðingarnar

Tað, at Starvsmannafelagið hevur gjørt av at klaga og stevna Tórshavnar kommunu, merkir ikki, at felagið hevur lagt møgulig onnur stríðsamboð á hillina.

Starvsmannafelagið veit væl, at Tórshavnar kommuna hevur avgjørt at seta ta nýggju skipanina fyri læknaørindi og jarðarferð í gildi tann 1. juli fyri at fáa felagið at steðga arbeiðnum í summarfrítíðini og harvið spara pening, uttan at tað nervar kommununa.

Men soleiðis verður ikki. Starvsmannafelagið fer sjálvt at avgera, um og nær møgulig onnur tiltøk enn klaga og stevning skulu setast í verk.

Brævið er undirskrivað av Heina Joensen, virkandi formanni í Starvsmannafelagnum.



## Kórvitjan úr Suðurslesvig

KÓRVITJAN
*Tíðindaskriv*

Í dag, leygardagin, fær Fuglafjarðar sangkór vitjan av Torsdagskoret úr Suðurslesvík. Kórið kemur til Føroya í dag, leygardag, og býr í skótahúsinum á Kambsdali.

Kórleiðari tess er Aase Pejtersen, sum er tónleikalærari í Gustav Johannsen-Skolen í Flensborg, sum er skúli fyri danska minnilutan í Suðurslesvík. Fuglafjarðar gentukór var og vitjaði Aase Pejtersen 1994. Hetta var ein sera væleydnaður túrur.

Sunnudagin 27. juni syngur kórið undir guðstænastuni í Fuglafjarðar kirkju kl. 11 og hevur konsert í kirkjuni kl 16.

Mánadagin 28. juni kl 20 konsert í Christianskirkjuni í Klaksvík.

Týsdagin 29. juni kl 20 konsert i Eiðis kirkju.

Mikudagin 30. juni kl. 19:30 konsert í Norðurlandahúsinum

Fríggjadgain 2. juli kl.17 konsert í Kirkjubøar kirkju.

## Skeið fyri fólk við kikarasjón

EYGNASJÚKA
*Tíðindaskriv*

Í februar var ein temadagur á Blindastovninum um eygnasjúkuna Retinitis Pigmentosa (kikarasjón), har fólk úr Danmark við kunnleika til sjúkuna hildu skeið.

Góð undirtøka var á skeiðnum, ið gav íblástur til at gera ein áhugabólk, sum kundi skipa fyri skeiðum og tiltøkum.

Tá tað óiva eru fleiri, sum sita runt um í landinum og møguliga hava eygasjúkuna, hevði tað verið ynskiligt, at hesi ella teirra avvarandi gjørdu vart við seg, tí tá hevði verið betur møguleiki fyri at skipa fyri størri skeiðum og tiltøkum - bæði fyri teimum, ið hava egnasjúkuna og teirra avvarandi.

*Við í áhugabólkinum eru:*
- Niels Olsen (avvarandi)
- Sólva Vang (avvarandi)
- Anna Nielsen (hevur eygnasjúkuna)
- Ruth Thomsen (hevur eygnasjúkuna)

*Áhugað kunnu venda sær til Ruth Thomsen tlf. 316755*




**Løg til Songbók Føroya Fólks**
**er at fáa í bókasølunum kring landið.**

Vegna feil í prentingini kunnu bøkur, ið vóru keyptar áðrenn 20. apríl 2004, býtast um við nýggja. Hetta skal verða gjørt har, hon upprunaliga bleiv keypt. **Kostnaður kr. 480**